Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Tórshavn, 2. mai 2024
Journal nr.: 24/10232

Svar upp á fyrispurning frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, um bót til alifyritøku, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal (at svara skrivliga eftir TS § 52 a), nr. 52-116/2023

Fyrispurningur

1. Nær kann væntast at frætta um bótina til alifyritøkuna Bakkafrost?
2. Hví er málið ikki avgreitt?
3. Tá bótin verður goldin, fer hon so í landskassan ella í danska statskassan?

Svar

Spurningur nr. 1 og nr. 2
Spurningur nr. 1 og nr. 2 verða svaraðir undir einum.

Heilsufrøðiliga starvsstovan, ið er stovnur undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, hevur viðgjørt og tikið støðu í málinum. Málið varð sent fútanum til støðutakan á vári í 2022.

Sum áður er upplýst Løgtinginum, so er tað fútin, ið hevur málsræði á málinum, tá málið er fráboðað fútanum. Eftir tað er Heilsufrøðiliga starvsstovan einans við til at upplýsa málið.

Sum skilst verður arbeitt við málinum.

Spurningur nr. 3
Um ikki serstøk avtala er gjørd, fara inntøkur frá sektum í danska statskassan, sí § 52a fyrispurning og svar í løgtingsmáli 52-108/2023. Sum løgmaður upplýsir í svarinum, so verður arbeitt við einum øðrvísi býti av sektum millum ríkiskassan og landskassan.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 2. mai 2024

Høgni Hoydal
landsstýrismaður